# Málslúkurin

**Halltóra Joensen hevur hesa ferð markerað seg sum kanska vandamesti álopsleikarin í kappingini, og hetta máttu eisini tær av Gotlandi ásanna**

SAMRØÐA
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Hóast føroyskt gull á oyggjaleikunum fyri tveimum árum síðani, so gjørdist tann kappingin ikki tann stóra upplivingin, sum Halltóra Joensen hevði vónað. At hon telist millum vandamestu føroysku álopsleikararnar man lítil ivi vera um, men tað ferðina fyri tveimum árum síðani fann hon ongan tíð veg til meskarnar.

Hesa ferð var tó øðrvísi. Saman við Malenu Josephsen var hon fastur partur av føroyska álopinum, og ferð eftir ferð máttu málverjarnir hjá hinum ásanna, at har var ov nógv krút í gaggum hennara, til at skotini kundu takast.

Og soleiðis var eisini í finaludystinum fríggjadagin, har Halltóra stóð fyri teimum báðum fyrstu føroysku málunum, og tað var sjálvandi eisini ein fegin Halltóra, sum vit fingu orðið á eftir dystin.

- Hatta var gott. Vit koma út til seinna hálvleik við tveimum málum á odda, men eftir lítlari løtu hava tær javna. Tað gav okkum nervar, og vit høvdu sera ilt við at fáa gongd á spælið, men vit komu aftur. Vit hava alla tíðina trúð uppá, at tað skuldi bera til at endurvinna gullið, og tíbetur fóru vit ikki niður við høvdinum, fyri tí at tað nú gekk nakað ímóti. Tað var næstan tað besta, at vit kortini megnaðu at koma so væl afturíaftur, segði Halltóra at enda.



Halltóra Joensen, sum fekk tvey tey fyrstu málini, hevur víst seg sum ein vandamikil álopsleikari á leikunum

Føroyar-Gotland 5-2 (2-0):

# Vunnu á skelkinum



Halltóra Joensen, sum fekk tvey tey fyrstu málini, hevur víst seg sum ein vandamikil álopsleikari á leikunum

**Eftir at hava tveitt tvey mál stóra leiðslu burtur, reistust føroysku fótbóltskvinnurnar, so tær kortini vunnu ein sannførandi finalusigur**

FÓTBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Fótbóltskvinnurnar endurvunnu gullið, sum tær ognaðu sær á Man fyri tveimum árum síðani.

Hóast stór skifti á liðnum, so var sjáldan nakar ivi um, at okkara áttu besta liðið á leikunum hesaferð, og heldur ikki í finaluni var líkt til, at liðið skuldi hava nakrar trupulleikar.

Fyrra umfarið høvdu okkara fyri tað mesta tamarhald á øllum. Halltóra Joensen kundi tíðliga í dystinum leggja Føroyar framum, og tá hon so við einari sannari perlu økti nakað undan steðginum, tóktist einki kunna steðga føroyska liðnum.

Men Rebecca Martis vildi tað tó øðrvísi. Hon var kanska leikarin, sum okkara óttaðust fram um aðrar, og efitr lítlari løtu hevði hon eisini sýnt hví. Við tveimum málum beint eftir steðgin hevði hon fingið javnvág í dystin aftur, og so var alt opið aftur. Báðir partar royndu nú at trýsta, og serliga á miðvøllinum gekk nógv fyri seg, og tað var eisini higanni, at avgerandi málini komu. Eyðvør úr Dímun bæði byrjaði og endaði álopið, sum førdi 3-2 málið við sær, og tá hon eftir hornaspark økti til 4-2, var Gotland liðugt. Í eini seinastu roynd tveittu tær nógv fólk fram á vøllin, men hetta gav bara rúm fyri føroyskum kontra, og undir einum av hesum slapp Rannvá sær av við alla mótstøðuverjuna, áðrenn hon ísakal sendi bóltin í netið til endaliga úrslitið.

**Føroyar-Gotland 5-2 (2-0)**
1-0: Halltóra Joensen
2-0: Halltóra Joensen
2-1: Rebecca Martis
2-2: Rebecca Martis
3-2: Eyðvør úr Dímun
4-2: Eyðvør úr Dímun
5-2: Rannvá Andreasen
**Føroyar:** Randi Wardum - Sólva Joensen, Ragna Andreasen, Bára Skaale Klakstein, Anne Lisa Justesen - Ása á Neystabø, Eyðvør úr Dímun, Rannvá Andreasen, Vivian Bjartalíð - Halltóra Joensen, Malena Josephsen

**Máltindurin 1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin á Lakjuni | B36 | 6 |
| John Petersen | B36 | 6 |
| Andrew av Fløtum | HB | 6 |
| Sonni L. Petersen | NSÍ | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Birgir Jørgensen | VB | 5 |
| Karsten From | HB | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Jákup á Borg | B36 | 3 |
| Dánjal Hansen | B68 | 3 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 3 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 3 |
| Milan Kulic | VB | 3 |

## Ongin finala til Kjartan Eli

Kjartan Eli Hentze tapti fríggjadagin hálvfinaluna ímóti Michael Svensson. Sostatt fekk Kjartan Eli eitt triðja pláss, og slapp ikki víðari í finaluna. Mett varð annars frammanundan, at Kjartan Eli hevði ein hampuligan møguleika, tí hann hevði vunnið ímóti hesum sama manni í liðkappingini. Men úrslitið gjørdist 2-4 til Michael Svensson.

**-ib**

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 21 | 7 | 14 | 19 |
| 2 NSÍ | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 20 | 9 | 11 | 19 |
| 3 HB | 9 | 5 | - | 3 | - | 1 | 22 | 11 | 11 | 18 |
| 4 B68 | 9 | 3 | - | 5 | - | 1 | 8 | 5 | 3 | 14 |
| 5 KÍ | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 10 | 15 | -5 | 14 |
| 6 EB/Streymur | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 14 | 14 | 0 | 13 |
| 7 GÍ | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 12 | 14 | -2 | 12 |
| 8 FS V | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 10 | 20 | -10 | 7 |
| 9 VB | 9 | 1 | - | 3 | - | 5 | 9 | 18 | -9 | 6 |
| 10 Skála | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 6 | 19 | -13 | 3 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 8 | 7 | - | 1 | - | 0 | 19 | 6 | 13 | 22 |
| 2 Sumba | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 21 | 5 | 16 | 17 |
| 3 VB | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 15 | 10 | 5 | 13 |
| 4 TB | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 13 |
| 5 AB | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 12 |
| 6 KÍ | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 14 | 24 | -10 | 12 |
| 7 LÍF | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 9 | 17 | -8 | 10 |
| 8 B71 | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 12 | 10 | 2 | 7 |
| 9 B36 | 8 | 1 | - | 3 | - | 4 | 10 | 13 | -3 | 6 |
| 10 B68 | 8 | 0 | - | 1 | - | 7 | 4 | 28 | -24 | 1 |



Føroyar-Saaremmaa 2-3 (23-25, 22-25, 25-21, 27-25, 16-18):

# Ein vakur deyði

**Føroyska manslandsliðið í flogbólti fekk heldur ikki gull hesaferð. Men í finaludystinum móti Saaremaa vóru teir partur av kanska mest dramatiska dystinum á leikunum yvirhøvur**

FLOGBÓLTUR
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** «Eg segði eftir dystin í bólki A millum Føroyar og Áland, at um vit komu at síggja nakran betri dyst á leikunum, so skuldi eg eta mín Daniel the Donkey maskot. So um onkur vil vera so vinarligur at geva mær saltið, so kann eg fara ígongd«

Somikið bersøgin var greinaskrivarin í 24 síðu stóra Oyl-innlegginum hjá Guernsey Press, tá hann skuldi geva sína meting av mansfinaluni í flogbólti, sum varð leikt fríggjadagin seinnapart.



Rúni Weihe í atsókn í finaluni ímóti Saaremaa, sum Føroyar taptu sera tepur

Mynd: Álvur Haraldsen

Ein finala, sum varð avgjørd á ringast hugsandi hátt, tá ein serva frá Saaremaa tóm netið áðrenn hon datt niður í føroyska gólvið. Men samstundis ein finala, har áskoðararnir undan hesum høvdu verið vitni til ein dramatiskan fimmsettara, har eydnan fleiri ferðir tóktist skifta hendir, og júst sum vit hildu hana vera hjá okkum, leyp hon yvir um aftur.

Fyrstu settini var tó ikki tað heilt nógva, sum bendi á, at talan skuldi gerast um slíkan spenning. Saaremaa hevði sýnt stórspæl allan vegin til finaluna, og eitt nú gav 3-0 bankurin av Álandi í hálvfinaluni greiðar ábendingar um, at talan var um eitt sera sterkt lið.

Fyrstu tvey settini tóktist tað heilt greitt vera Saaremma, sum var við yvirlutan. Serliga fyrsta settið høvdu okkara tungt við at koma ígongd, og tó at munurin bert var tvey stig, so var eingin ivi um, at mótstøðumenninir áttu hetta uppiborið. Næsta settið omu okkara betri við, og eitt skifti var leiðslan 15-10, men so setti Saaremaa torbona á. Eftir stuttari løtu høvdu teir vent hesum til 21-18, og so kundu teir eisini taka hetta settið.

Og tað líktist á mangan hátt endastøðini hjá føroyska liðnum, at teir soleiðis høvdu tveitt leiðsluna burtur, men teir góvust tó ikki á hondum. Við sama ófatuliga stríðsvilja, sum var borganin fyri sigurin á Álandi stríddu teir seg aftur í dystin. Hóast Saaremaa framvegis tóktist hava bestu orkuna, og hóast teirra spæl var meira ágangandi, so hildu hvítu menninir fast. Hvussu fegnir hinir so vildu, so sluppu teir ikki undan føroyingunum.

Liðini fylgdust allan vegin upp, men tá Bartal við einari sannari kanón av einum blokki slerdi smashið frá Ounpuu niður í gólvið, gav hetta líka sum eitt eyka lyft. Føroyska áskoðarafjøldin kom í kók, tá Føroyar við trimum bóltum á rað nú tóku settið heim, og í fjórða helt gongdin fram. Føroyingarnir tóktust hava vunnið sálarliga yvirtakið. Blokkurin fekk alsamt fatur á fleiri bóltum, og Rúni Weihe gravaði djúpt í sær sjálvum í royndunum at finna avgerandi bóltarnar. Sjálvt ikki ein matchbóltur til Saaremaa við støðuni 24-23, var nóg mikið. Undir trýstið frá kókandi høllini servaðu Saaremaa búgvarnir í netið, og so tóku okkara yvir.

Hetta noyddi Saaremaa út í eitt fimta sett, og sum teir komu út við hangandi høvdið, líktust teir nú einum liði uttan sjálvsálit. Men hetta vóru kanska bert lótir. Framvegis hildu teir trýstinum á okkara monnum, og nú vóru eisini fleiri nervakend mistøk at síggja frá okkara síðu. Báðir partar skiftust um at sláa servur í netið, men største dramaið var enn ikki komið. Hetta varð goymt til tað allar seinasta, tá Saaremaa aftur fekk dystarbólt. Ikki færri enn tríggjar av slagnum megnaðu føroyingarnir at verja fyri, men vit fingu ongan tíð møguleikan, at standa við avgerðini sjálvir, og so gjørdist net-servan frá Lember avgerandi.

Føroysku leikararnir toygdu seg í hvørjari lykkju eftir bóltinum, men tað kundi gera tað sama, og meðan grønu herurin dansaði runt á gólvinum í sigursrúsi, lógu samfullir føroyskir leikarar á gólvinum. Teir høvdu givið alt tað, sum teir høvdu í sær, men teir doyðu kortini ein vakran deyða. Kanska er tíðin langt síðani farin frá tí, sum vit rópa heiðurligt tap, men okkara eiga kortini stóran heiður av dystinum. Tað skulu tveir partar til fyri at skapa ein góðan dyst, og hetta var helst tann besti, sum var á leikunum.



Liðformaðurin Rúni Weihe var sum vera man sera vónbrotin eftir finaluna

Mynd: Álvur Haralsen

## Góvu alt

**Føroyski liðskiparin helt eftir finaludystin, at føroyska liðið spældi upp til sítt allarbesta, og at tað nokk ikki var so nógv, sum teir kundu gjørt øðrvísi**

SAMRØÐA
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Føroyski liðskiparin, Rúni Weihe, segði undan finaludystinum, at um føroyingar góvu alt tað, sum teir høvdu, so kundi liðið ikki gera meira, og so máttu vit bara síggja, hvussu langt hetta rakk.

At leikararnir góvu alt tað, sum teir høvdu, mundi lítil ivi vera um eftir finaluna, men tað var mest sum ov nógv, at talan so kortini skuldi gerast um eitt somikið tepurt tap.

- Ja, vit góvu alt. Hatta er ein øgiliga heppin endi hjá teimum, men vit kundu neyvan gjørt meira. Eins og móti Álandi koma vit aftur, eftir at teir hava vunnið tvey sett. Munurin var alla tíðina lítil, og tað vóru kanska eitt ella tvey mistøk, sum vóru avgerandi, men tað var so tað. Vit spældu tað, sum vit kunnu spæla, men tað var bara akkurát ikki nóg mikið.

Og at enda, so hevði liðskiparin eisini nøkur rósandi orð at bera áskoðarunum, sum fram til tað seinasta royndu at hjálpa liðnum fram til sigurs.

- Tað er so absolutt nakað, sum vit seta prís uppá. Tú følir alla tíðina, at tú hevur stuðul á vøllinum, og tað hevur nógv at siga, segði Rúni Weihe at enda.

# Bronsa til Heina

**Sum fyrsti føroyingurin nakran tíð megnaði Heini Joensen at vinna heiðursmerki í spjótkasti á oyggjaleikunum**

SPJÓTKAST
*Jákup*

**Guernsey**: Hann hevur í nógv ár verið roknaður sum ein hin vandamesti føroyski hondbóltsleikarin, og komandi árið skal hann royna seg í bestu donsku deildini. Men at Heini Joensen eisini dugir at nýta vinstru hondina til annað enn hondbóltin sýndi hann fríggjadagin.

Tá var finalan í spjótkasti á skránni á oyggjaleikunum, og her eydnaðist Heina at vinna sær bronsu. Kastið, sum tryggjaði honum hesa, var heilt úti á 54,28 metrum, og hetta er ikki minni enn fýra metrar betri enn føroyska metið var undan leikunum. Í Danmark hevur Heini annars verið úti á góðum 52 metrum, men tá hetta ikki hevur verið gjørt undir eftirliti, hevur ikki borið til at skrásett kastið sum føroyskt met.

Nú er so eingin ivi um metið, og spurningurin er so, hvussu langt Heini kann koma í hesi ítróttargreinini. Vinnandi kastið var einar seks metrar longri enn tað hjá Heina, men við støðugari venjing átti at borið til hjá kollfirðinginum at betra seg munandi í greinini, soleiðis at metallið kanska kann gerast enn fínari í Hetlandi um tvey ár.